BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Til skúlaleiðslur og nemingaráð

24. september 2023
Mál: -
Viðgjørt: HW

**Vetrarfrí í viku 7**

Góðu skúlaleiðarar og næmingaráð

Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum, ætlar komandi skúlaár at seta í verk eina viku vetrarfrí í fólkaskúlanum, sum skal verða í viku 7 á hvørjum ári. Tískil verður summarfrítíðin stytt úr 8 vikum niður í 7 vikur, har 2 skúladagar verða afturat í juni, og skúlagongdin byrjar 3 dagar fyrr í august.

Grundgevingin fyri hesi broyting er í høvuðsheitum, at tað væntandi fer at koma væl við hjá næmingum, at fáa eina viku vetrarfrí. Veturin og tíðin frá jólum til páskir kann tykjast heldur long, drúgv, myrk og møðandi, og við eini fríviku í februar, koma næmingarnir væntandi at hava meira orku, ídni og áhaldni til at læra og fylgja undirvísingini um veturin.

Omanfyrinevnda broyting er ein fyrimunur fyri teir næmingar, hvørs foreldur búgva uttanlands, so tey kunnu vitja síni foreldur uttan at noyðast at hava fráveru frá skúlanum. Samstundis er summarfrítíðin heldur long og tí nakað leingi hjá næmingunum at vera burtur frá skúlanum, eins og nógvar familjur hava avbjóðingar við at halda summarfrítíðina saman, tí flestu foreldur hava 5-6 vikur av frítíð um árið.

Fyribils verður hetta galdandi í eini royndartíð í 3 ár, t.v.s. skúlaárini 2024-2027.

Áðrenn landsstýrismaðurin setir hetta í verk, vil hann fegin geva øllum skúlaleiðslum, t.v.s. skúlastjórum, varaskúlastjórum, fyrstilærarum og einalærarum, umframt øllum næmingaráðum kring landið, høvi til at siga sína hugsan um hesa ætlan. Heitt verður tí vinarliga á tykkum skúlaleiðslur,

Tinghúsvegur 7 • FO-100 Tórshavn • Tel: +298 306500 • bumr@bumr.fo

um eisini at senda málið til hoyringar hjá øðrum viðkomandi pørtum, tað veri seg hjá nemingaráðum í skúlanum, hjá umboðunum í tykkara skúlastýri, umframt hjá námsfrøðiliga ráðnum í tykkara skúla.

Viðmerkjast skal, at landsstýrismaðurin á fundi við Føroya Lærarafelag, Felagið Heim og skúla, Skúlaleiðarafelagið, Kommunufelagið og Pedagogfelagið hevur umrøtt hesa ætlan, har bæði grundgevingar fyri og ímóti vetrarfrítíð vóru viðgjørdar:

| Grundgevingar fyri vetrarfrítíð | Grundgevingar ímóti vetrarfrítíð |
|---|---|
| Ov long tíð frá jólum til páskir. Betri við eini fríviku í viku 7 til næmingarnar at løða nýggja orku | Ov nógv avbrot í árligu skúlagongdini brýtur góða rytmu, heldur varðveita samanhangandi skúlatíð |
| Líka sum onnur Norðurlond, grannalond og lond í norðurvestur Europa, sum ikki vilja avtaka vetrarfrí | Vetrarfrí er ikki allastaðni í DK í viku 7. Hetta viknar argumentið ísv. børn, ið vitja foreldur í DK. |
| At summarfrítíðin verður stytt, so tað ikki verður so langt tíðarskeið hjá næmingunum burtur frá skúla | Næmingar, sum í dag vilja vitja foreldur í DK í viku 7, fáa stuðul og hjálp til henda møguleika |
| Meira tíð til undirvísing úti teir ljósu dagarnar | Betri at hava frí ljósu tíðina heldur enn myrku |

Freistin at svara er fríggjadagin 6. oktober 2023.
Møguligar viðmerkingar kunnu sendast við telduposti til: bumr@bumr.fo, tilskilað til Høgna Warberg.

Vinarliga

Barna og útbúgvingarmálaráðið

Høgni V. Warberg, *fulltrúi*